# Avgjørt brúk fyri fakfelagsrørsluni

## Mikudagin hevði Starvsmannafelagið móttøku í sambandi við, at felagið fylti 50 ár



*Myndir: Álvur Haraldsen*

**Fitt av fólki vitjaði inni á gólvinum hjá Starvsmannafelagnum, nú felagið fór um hálva øld. Millum teirra vóru formenn og nevndarlimir í øðrum fakfeløgum og í hvussu er tveir av fyrrverandi formonnum felagsins. Verandi forkvinnan, Semla Ellingsgaard, var bæði fegin og errin at standa á odda fyri felagnum hendan merkisdagin. Hon heldur, at tað so avgjørt er brúk fyri fakfelagsrørsluni enn í dag, og at fakfeløgini í dag í enn størri mun mugu standa saman.**













